# VALSKRÁ

## – SKIL Í

Føroya Javnaðarflokkur

Løgtingsvalið **2022**

JAVNAÐARFLOKKURIN

## Bústaðir til øll

**Ein bústaður er** eitt heim – ikki ein vøra. Øll skulu hava atgongd til eitt heim, sum hóskar til teirra tørv og lívsstøðu.

Bústaðarmynstrið skal vera fjølbroyttari. Fyri at tryggja savningarmegina í landinum er umráðandi, at hálønt og láglønt, ung og gomul búgva í somu grannaløgum.

Vit skulu hava fleiri bíligar leigu- og lutaíbúðir, íbúðir til lesandi, til fólk við serligum tørvi, eldraíbúðir, eigaraíbúðir og sethús kring alt landið. Felagið Bústaðir skal vera ein lyklaleikari í hesum. Felagið skal rekast sum ein almennur stovnur og ikki sum partafelag.

Kommunur og Bústaðir skulu kunna stovna almannagagnlig bústaðafeløg, sum skulu tryggja lægri húsaleigur kring alt landið.

Eisini vilja vit seta í verk bústaðarstuðul til láginntøkubólkar, sum ikki eru førir fyri at rinda fulla húsaleigu í almennagagnligum leigubústøðum.

Útlendingar og útlendskar fyritøkur, sum ikki hava tilknýti til landið, skulu ikki kunna uppkeypa fastogn í Føroyum.

## Arbeiðsvikan skal styttast

**Krøvini til fólk** eru vaksandi, og talið á teimum, sum gerast strongd, bara økist. Mong hava ilt við at fáa arbeiðslív og familjulív at hanga saman. Tí skulu vit stytta arbeiðsvikuna og fáa størri ræði á okkara egnu tíð.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at arbeiðsvikan eftir fáum árum skal niður í 37 tímar, so at vit kunnu heinta børnini fyrr, vitja okkara kæru ella luttaka í felagslívi. Løða upp ella gera tað, vit aldrin náa.

Lønin skal vera óbroytt, hóast arbeiðstíðin minkar. Fólk, sum arbeiða niðursetta tíð, fáa harvið hægri løn, tí brøkurin verður nærri fullari arbeiðsviku.

Vit hava eisini ein stóran hóp av væl skikkaðum eldri fólki, sum fegin vildu tikið eitt tak av og á, um tað loysti seg. Fyri at økja um arbeiðsmegina fer Javnaðarflokkurin tí at arbeiða fyri, at pensjónistar yvir tíð sleppa undan at arbeiðsinntøkan verður mótroknað í fólkapensjónini.

## Lønarlyft til umsorganarøkið

**Sambært tølum fara** 1000 starvsfólk at mangla í um fá ár, um onki verður gjørt. Tí má starvsfólkatrotið loysast. Lønarlagið er partur av orsøkini – og av loysnini. Tí vil Javnaðarflokkurin endurskoða almenna lønarlagið og lyfta lønina hjá starvsfólkum innan heilsu og umsorgan.

Almenna lønarskipanin má endurskoðast, so javnvág verður millum førleikar, ábyrgd og løn, og lønarhækkingarnar skulu helst latast

í krónum heldur enn prosentum, so ójavnin ikki økist við tíðini.

## Batar til lág- og miðalønt

**Javnaðarflokkurin ætlar at** geva skattalætta til lág- og miðallønt. Sum partur av skattalættanum verður ein hægri barnafrádráttur, sum fyrst og fremst skal markast til familjur við miðal og lægri inntøkum.

Fyri at gera gerandisdagin lættari, eigur MVG á gerandisvørum sum mjólk, breyði, frukt og grønmeti at verða lækkað.

Fíggjarliga sperd húski skulu kunna søkja um fíggjarligt ískoyti, nú vit eru rakt av ógvusligum príshækkingum.

Príseftirlit og brúkaratrygd skal styrkjast.

Eisini skal viðbótin til teir pensjónistar, sum hava minst at liva av, hækka.

Fortreytin fyri øllum vallyftum er, at tey eru fíggjað. Tí skulu tær vinnur, sum hava fingið framíhjárættindi at troyta náttúrutilfeingi Føroya, rinda meira til felagsskapin.

## Bindandi umhvørvisátøk

**Ein av heimsins** størstu avbjóðingunum er veðurlagskreppan, og vit mugu gera okkara part. Skjótt og rættvíst grønt orkuskifti skal til.

Vit skulu fremja stórar broytingar í brúks- og orkuvanunum. Men vit kunnu ikki krevja líka nógv av øllum. Solidariskar skipanir skulu tryggja, at allir lønarbólkar og landspartar koma við í grøna skiftið, og at øll hava ráð at leggja um til grøna orku.

Vit skulu hava eina bindandi veðurlagslóg, og í 2030 skal øll el-orka á landi vera frá grønum orkukeldum, eins og helmingurin av øllum burturkasti skal endurnýtast.

Vit skulu stimbra og stuðla gransking og menning innan høvuðsvinnurnar, so tær gerast so umhvørvisvinarligar sum til ber.

Stuttflutt framleiðsla er burðardygg framleiðsla. Tí skulu vit stimbra vistfrøðiligari mat- og grønmetisframleiðslu í Føroyum.

Vit mugu taka ábyrgd, so komandi ættarlið fáa somu møguleikar, sum vit.

## Heilsuverkið skal styrkjast

**Heilsutilboðini í Føroyum** skulu verða á sama støði sum í grannalondunum. Eisini skulu tey vera somikið góð, at eingin skal hava tørv á privatari sjúkratrygging.

Starvsfólkatrot og manglandi samstarv millum geirar eru størstu avbjóðingarnar í dag. Tí vil Javnaðarflokkurin virka fyri, at fleiri fólk verða sett, so trýstið á verandi starvsfólk minkar. Bíðilistarnir til álvarsligar sjúkur og psykiatriina skulu styttast og serlæknapuljurnar verða smidligari.

Harumframt skulu vit hava betri samstarv og samskipan millum geirarnar á heilsu- og almannaøkinum: Frá kanning og innlegging til útskriving og endurvenjing.

Samskiparar skulu hava heimild at arbeiða tvørtur um geirar – millum heilsuverk, almannaverk og eldrarøktina í kommununum.

Málið má vera, at øll í Føroyum skulu hava egnan kommunulækna.

## Batar undir Almannaverkinum

**Øll skulu hava** eitt gott og innihaldsríkt lív uttan mun til avbjóðingar. Innan almannaverkið er mest átrokandi at økja starvsfólkatalið og at bøta um umstøðurnar, stytta bíðilistarnar og at skapa bústaðartilboð.

Javnaðarflokkurin vil, at hjálpin skal vera samanhangandi, og at avgerðir skulu takast í samráð við tey, tað snýr seg um, og teirra avvarðandi.

Vit skulu hava eitt tíðarhóskandi barnaheim og bøta um tilboðini til familjur, sum hava børn við serligum tørvi. Øll skulu hava EINA hurð at venda sær til, so tey ikki skulu stríðast við nógvar ymsar myndugleikar, tá ið teimum tørvar hjálp. Hartil skal skipanin við fosturforeldrum endurskoðast og styrkjast – eisini tá børnini hava serligan tørv.

## Mentan og list skulu stuðlast – ikki stýrast

**Listin skal vera** fræls. Hon skal stuðlast – ikki stýrast. Prinsippið um armslongd frá politiska myndugleikanum skal styrkjast, so einstaka landsstýrisfólkið ikki skal gera av, hvør list hevur uppiborið stuðul.

Børn og ung skulu hava betri atgongd til mentan og list – bæði gjøgnum fólkaskúlan, føroyskt tilfar og musikkskúlan.

Javnaðarflokkurin ætlar, at tað, vit rinda í MVG til útlendskar streymingstænastur – minst 13 milliónir – skal í føroyska landskassan og markast til mentan og list.

Fíggjarliga afturberingin til filmsframleiðslu í Føroyum skal økjast, so fleiri stórar filmsverkætlanir koma hendavegin, og játtanin til filmsgrunnin skal líðandi økjast.

Tjóðleikhúsið skal byggjast.

## Betri javnvág millum ferðavinnu og náttúru

**Ein burðardyggur ferðavinnupolitikkur** skal tryggja eina sunna javnvág, har atlit verða tikin til bæði menniskju og náttúru. Skal ferðavinnan hava tað gott, má náttúran hava tað gott. Uttan óspilta náttúru vóru Føroyar ikki eitt lokkandi ferðamál. Og uttan rætt til frítt at ganga í haganum, var lívið hjá nógvum føroyingum fátækari.

Tí skal hetta loysast í tveimum:

Javnaðarflokkurin vil loysa málið um gongd í haga við lóggávu, sum tryggjar rættin hjá føroyingum at njóta egnu náttúru. Frá útlendingum kann gjald verða tikið undir skipaðum umstøðum. Men vit skulu eisini hava lendislóggávu og náttúruverndarlóg, so fyrilit altíð verða tikin fyri náttúruni.

Ferðavinnan skal vaksa – men vit skulu ikki rinda við okkara náttúru.

## Samhaldsføst samferðsla

Strandferðslan skal mennast – ikki privatiserast. Burðardygd og samhaldsfesti skulu eyðkenna samferðsluøkið. Arbeiðið við Suðuroyartunnlinum heldur fram, og skip, vegir og tunlar skulu dagførast og viðlíkahaldast. Ein ætlan um at endurnýggja flotan hjá Strandferðsluni skal gerast.

Akfør hjá Strandferðsluni skulu rekast við grønari orku, og tilboðini skulu støðugt útbyggjast, so vit minka um tørvin á bilum.

## Børnini fyrst

Alt, vit gera, ger tað sama, um børnini ikki hava tað gott. Tí skulu Føroyar skal vera heimsins besta land at vaksa upp í. Øll børn skulu hava somu møguleikar at skapa sær eitt gott lív og fylgja sínum dreymum, sama hvussu nógv foreldrini eiga.

Vit skulu hava eina barsilsskipan, har vit, umframt barsilsfarloyvi, hava umsorganardagar, sum familjan kann nýta eftir tørvi til barnið er 7 ár. Umstøðurnar hjá foreldrum, ið fáa tvíburðar, skulu betrast.

Vit skulu hava minimumsnormeringar á dagstovnunum, soleiðis, at tað altíð er nóg mikið av faklærdum fólki um børnini. Skúladagurin skal styttast, og heldur enn at skipa hann sambært landsroyndum og Pisa, skal hvørt barn hava meira beinleiðis læraratíð. Leikluturin hjá flokslæraranum skal styrkjast, og vit skulu hava tvílæraraskipan í øllum flokkum í grunddeildini.

Javnaðarflokkurin ætlar at víðka um tíðarskeiðið, har ung fáa ókeypis tannrøkt til og við 21 ára aldur.

Eisini skal lestrarstuðulin so líðandi økjast, so hann er á sama støði sum í Danmark.

## Fíggjarlig ábyrgd

Fortreytin fyri javnaðarpolitikki er skynsamur fíggjarpolitikkur. Tað merkir millum annað, at lán skulu gjaldast niður, peningur setast til viks og íløgur útsetast í góðum tíðum. Tá tíðirnar gerast verri, skal tað almenna hava styrki til at gera íløgur, sum skapa arbeiði og inntøkur.

Tað eru altíð tey veikastu, sum verða harðast rakt, tá ið tíðirnar versna og arbeiðsloysið økist. Tí skulu vit fyribyrgja stórum sveiggjum í búskapinum.

Skynsamur fíggjarpolitikkur merkir eisini, at hvør króna, sum vit krevja inn í skatti, skal brúkast við skili, og at almennar skipanir støðugt skulu eftirmetast, so vit fáa sum mest fyri skattapengarnar.

## Handilssáttmálar

Okkara atgongd til ES-marknaðin er ikki nóg góð, og tað skerjir møguleikarnar hjá útflutningsvinnunum.





Vit fara at leggja nógv fyri til tess at tryggja, at fyritøkurnar í hesum vinnum skulu kunna selja virkaðar vørur til ES uttan at gjalda so nógvan toll, sum í dag.

Betri handilssáttmálar við onnur lond – eitt nú USA, Japan og Suðurkorea – skulu eisini fáast í lag.

## Betri kor til smáar og nýggjar fyritøkur

Eitt fjølbroytt vinnulív tryggjar eitt fjølbroytt samfelag. Men við verandi vinnupolitikki gerast nakrar fáar fyritøkur so sterkar, at tær kunnu keypa annað vinnulív upp. Fyri at tryggja eitt fjølbroytt vinnulív, har rúm eisini er fyri smærri fyritøkum, sum standa á egnum beinum, skulu góð hugskot, dirvi og virkisfýsni stimbrast.

Vit skulu skapa góðar karmar og skipanir fyri fólk, sum vilja skapa nýtt virksemi, og smidleiki skal verða reyði tráðurin í allari vinnuligari umsiting. Almenna skipanin skal kennast sum ein viðspælari – ikki ein mótspælari.

Javnaðarflokkurin vil lækka partafelagsskattin, so at smáar fyritøkur rinda nakað minni enn stórar.

## Verja og trygd

Hóast verja og trygd eru felagsmál fyri alt ríkið, skal eingin avgerð á hesum øki, sum viðvíkir Føroyum, takast uttan um føroyskar myndugleikar. Vit skulu hava fult innlit í alt og eiga síðsta orðið í øllum, sum hevur við okkara land at gera.

Hugsan Javnaðarfloksins er, at Føroyar eru og skulu verða ein samrunnin partur av Vesturheiminum og tess verjuskipan, NATO. Tað krevur, at vit sýna ábyrgd mótvegis okkara sameindu í teimum avgerðum, vit taka.

JAVNAÐARFLOKKURIN